# Fylgiskjal II - Leiðreglur fyri brúkarar

**Loyniorð**

Loyniorð eru persónlig og skulu verða hildin loynilig. Tú hevur fulla ábyrgd av, at ongin annar enn tú veit loyniorðið. Loyniorðið skal vera bæði tøl og bókstavir. Loyniorðið skal ikki vera lætt hjá øðrum at gita. Loyniorðið skal altíð verða broytt, veitst tú, at onkur annar dugir tað. Loyniorðið má ikki goymast elektroniskt í klárum teksti.
Loyniorðið, sum verður nýtt, tá innritað verður á Landsnet, skal ikki verða nýtt aðrastaðni.

**Telduskíggjar**

Skíggjar eiga at standa soleiðis, at óviðkomandi ikki kunnu lesa á teimum.
Tá ið farið verður frá telduni, skal hon vera læst. Hetta kann verða gjørt við at trýsta á windowsknappin + L.
Gloymir tú at læsa telduna, tá ið tú fert frá henni, kann ein og hvør, sum kemur framvið, sleppa inn í telduna og hevur somu atgongd til upplýsingar sum tú, t.d. at lesa teldupost ella senda teldupost í tínum navni. Tú kanst tó minka henda váða við at tryggja tær, at teldan læsist sjálvvirkandi. Ert tú í iva, set teg so í samband við úrvalsbrúkaran.

**Internet**

Tað verður hildið at vera sjálvsagt, at tú brúkar internetið við umhugsni, og at tú leggur dent á trygdina. Rátt verður frá, at tú fert á heimasíður, sum tykjast ivasamar.
Tilfar, t.d. øll forrit og fílur, sum eru lógliga tikin niður av internetinum, eru "ogn" hjá stovninum og má bara verða nýtt samsvarandi reglum um upphavsrætt og lisensering.
Tað er ikki loyvt at taka niður ella goyma fílur við ósømiligum innihaldi. Heldur ikki er loyvt at taka niður tónleik/filmar, sum gera tað, at upphavsrætturin verður brotin ella at nýta tænastur, sum skuldbinda stovnin, hevur rætti viðkomandi evt. stjórin ikki givið greitt loyvi.

**Teldupostur**

Teldupostur er sum meginregla ogn hjá stovninum. Starvsfólkið kann nýta teldupost í dagliga arbeiðinum at senda og taka ímóti boðum og skjølum. Teldupostur eigur at verða skjalførdur sambært reglum á stovninum um skjalføring.

Teldupostur skal verða nýttur minst møguligt til privat samskifti og havt skal vera í huga, at stovnurin stendur sum tann, sum sent hevur. Verður telduposturin nýttur til privat samskifti, skal hann bera frámerki sum privat ella verða fluttur í mappu við frámerkinum privat fyri at minka vandan fyri, at óviðkomandi lesa privata teldupostin. *Privatur teldupostur er sjálvsagt privatur*.

Upplýsingar, sum verða fluttar um internetið t.d. við telduposti, skulu bronglast ella tryggjast á annan hátt, um trúnaður er neyðugur.
Teldupostar, sum innihalda viðkvæmar upplýsingar, skulu ikki goymast í teldupostkassanum.

Ikki er loyvt at senda teldupost við niðrandi innihaldi, undir hesum upplýsingar um uppruna, trúgv, politiska ella kynsliga sannføring.

Meginreglan er, at ikki er loyvt at lata upp teldupostkassan hjá starvsfólkinum.
Í heilt serligum førum tilskilar stovnurin sær tó rætt til teldupostkassan hjá starvsfólki, er tað alneyðugt av trygdarávum ella rakstrarávum. Er starvsfólkið sjálvt ikki til staðar, skulu starvsfólkaumboð og/ella trygdarfólk vera til staðar.

Áðrenn stig verða tikin til at lata upp teldupostkassan, skal starvsfólkið fáa tað at vita beinanvegin ella so skjótt eftir, sum til ber.
Tað er ikki loyvt at lata upp ella lesa privata teldupostin hjá starvsfólkinum, **hevur tað ikki nágreiniliga loyvt tí,** og tá skal starvsfólkaumboð og/ella trygdarfólk vera til staðar.

*Úr starvi*
Tá ið starvsfólk fer úr starvi, skal starvsfólkið rudda í teldupostkassanum, t.e. strika privatan teldupost og senda tað, sum stovnurin eigur, til næsta leiðara um ikki annað er avtalað. Hetta fevnir eisini um skjøl o.tíl., ið er goymt á fíluambætara og á øðrum miðlum, sum bert starvsfólkið hevur atgongd til.

Fer starvsfólk úr starvi á óvanligan hátt, t.d. tí tað er burturvíst, verður teldupostkassin beinanvegin gjørdur óvirkin. Tað stendur starvsfólki frítt at koma á arbeiðsplássið at rudda teldupostkassan og fílur saman við starvsfólkaumboði og/ella trygdarfólkinum.
Starvsfólk kann bert taka við sær teldupost o.a., ið ongin ivi kann vera um, er privat, um ikki annað er avtalað.
Ger starvsfólkið av ikki at koma aftur á arbeiðsplássið, so rudda netumsitarin saman við starvsfólkaumboði og/ella trygdarfólki teldupostkassan. Teir teldupostar, ið eru frámerktir privat, verða strikaðir beinanvegin.

*Víðarisenda teldupost sjálvvirkandi*
Tað er ikki loyvt at víðarisenda teldupost sjálvvirkandi til eina privata teldupostadressu, uttan greitt loyvi frá stjóranum/leiðaranum.

**Virus o.tíl.**
Í viðheftum fílum kunnu virus o.a. vera, sum kunnu gera óbótaligan skaða. Ver tí sera varin við at lata upp fílur, sum eru viðheftar teldubrøvum ella at trýsta á leinkjur í telduposti eisini um teir eru frá persónum, sum tú kennir. Ert tú í iva, vend tær tá til úrvalsbrúkaran.
Hevur tú illgrunað um, at tú hevur fingið virus á telduna, boða tá úrvalsbrúkara frá uttan drál.

**Logging**
Loggar verða fyrst og fremst nýttir til at tryggja stabilitet í rakstrinum, t.d. út frá hagtølum at finna útav, um onkur heimasíða tyngir skipanina. Teir kunnu eisini verða nýttir í sambandi við møguliga trygdarhending t.d. undandrátt ella trúnaðarbrot.

*Teldupostur (Exchange)*. Loggað verður, hvør sendir post til hvønn. Eisini verða gerðir hjá priviligeraðum brúkarum loggaðar, t.d um full atgongd verður fingin til ein postkassa.
*AD (Active directory)*. Loggað verður, tá brúkari loggar á/av Landsneti, bæði tá hesar áloggingar eydnast ella ikki eydnast.
*Fíluservari.* Onki verður loggað um brúkaran.
*Internetið (firewall)*. Tað verður loggað, hvørjar heimasíður verða vitjaðar.
*Trygdarskipan.* Loggað verður netsamskifti millum eindir í landsneti, og hvør var loggaður á eindina ávíst tíðarskeið. Loggað verður eisini, hvat samskifti eindirnar hava við heimasíður uttanfyri landsnet. Skipanin steðgar sjálvvirkandi illgrunasomum samskifti.

**Netsamband**
Hevur tú fremmanda teldu við til arbeiðis, t.e. telda, ið ikki er innlimað í Landsnet og brúk er fyri netsambandi, skal tráðleysa netið brúkast. Tað er ikki loyvt at knýta teldur beinleiðis við kápli í Landsnet, sum ikki eru innlimaðar.

Tú hevur ikki loyvi at fara uttan um trygdarskipanin á Landsneti við at knýta teg í internetið umvegis onnur netsambond enn tað, sum fæst gjøgnum Landsnet. T.d. er ikki loyvt at vera íbundin 4G net samstundis, sum teldan er íbundin Landsneti. Tú hevur ikki rætt at knýta netútgerð t.d. accesspoint í netið hjá stovninum.

**Farteldur**

Hevur tú fjararbeiðspláss (ikki á økinum hjá stovninum), skalt tú tryggja tær, at teldan hevur dagførda antivirusverju. Eru ivamál, set teg so í samband við úrvalsbrúkaran.
Farteldan skal verða vard móti stuldri, herverki og óviðkomandi atgongd. T.e. teldan skal vera vard við loyniorðið og goymd soleiðis, at ongin sleppur beinleiðis at henni, tá ið hon verður ikki brúkt. Verður farteldan mist burtur, skal hetta verða fráboðað úrvalsbrúkara ella KT-skivuni beinanvegin.
Tá ið arbeitt verður við farteldun i aðrastaðni enn á arbeiðsplássinum, t.d. heima ella á almennum støðum, kunnu onnur fylgja við í tí, tú gert. Hugsa tí tá serliga væl um at verja upplýsingarnar, tú arbeiðir við.
Tá ið ferðast verður við flogfari, bussi, toki ella skipi, skal farteldan vera í handviðførinum.
Meginreglan er, at persóns- ella trúnaðarupplýsingar skulu ikki verða goymdar á telduni.
Av tí at vanligt er at hava teldupostkassan á farteldum í Landsneti, so eiga hesar farteldur at hava bronglaðan harddisk. Sama er galdandi, um tað er neyðugt at goyma upplýsingar á farteldun i, ið eru flokkaðar sum trúnaðar/viðkvæmar upplýsingar (sí eisini dátuflokkingaryvirlitið).

**Fartelefonir, smartphones, teldlar og geymar**

*Fartelefon*
Trúnaðar/viðkvæmar upplýsingar mugu ikki verða sendar við sms-boðum ella goymdar á fartelefonini.

*Smartphone ella teldil*
Nýtir tú smartphone ella teldil við atgongd t.d. til teldupostkassan, skalt tú hugsa um, at hetta er ein lítil telda, sum m.a. kann synkronisera tín teldupost og kalendara, og harvið liggur tín teldupostur opin fyri einum, sum sleppur inn á 'mobilin'.
Tú mást ikki goyma viðkvæmar upplýsingar herundir forrætningskritiskar upplýsingar á smartphones ella teldlum, uttan at hesir miðlar eru tryggir, t.d. eru bronglaðir og at upplýsingarnar kunnu verða fluttar trygt av miðlinum í eitt trygt umhvørvi.
Smartphones og teldlar skulu verða væl vardar og hava loyniorð, sum ikki er lætt at gita.
Ansa eftir, tá tú leggur forrit (apps) á smartphone ella teldil. Fleiri av hesum forritum taka sær atgongd til alt møguligt t.d. heinta upplýsingar, sum liggja á 'mobilinum', uttan at tú varnast tí.
Tað er ikki loyvt at leggja Tiktok inn á snildfon ella teldil í teimum førum, snildfonin ella teldilin eisini hevur arbeiðsrelateraðar appir frá Landsneti ella stovninum sjálvum.
Ert tú í iva, spyr tá úrvalsbrúkaran á stovninum.

*Geymar*
Verða persóns- ella aðrar trúnaðarupplýsingar goymdar á geyma, skal geymin vera bronglaður ella hava kotu á. Rudda javnan á geymanum.
Nýt ikki privatar geymar í arbeiðsteldum og øvugt.
Finnir tú ein geyma, lat so vera við at seta hann í arbeiðstelduna, men lat hann til úrvalsbrúkaran.

*Burturmistir miðlar*

Verða fartelda, fartelefon, smartphones, teldil ella geymar burturmist, skal hetta verða fráboðað úrvalsbrúkara ella KT-skivuni beinanvegin.

**Cloud**
Hugsa teg væl um, áðrenn tú leggur dátur til cloud-tænastur sum t.d. Dropbox ella Apple iCloud. Vandi kann verða fyri, at tú tá brýtur Dátuverndarlógina.
Nevndu cloud-tænastur eru vanliga bert atkomuligar á tínum eindum - hugsa um tað, um tú ætlar at leggja forrætningskrittiskar upplýsingar í cloud og serliga, um onnur skulu hava atgongd til tær.

**Fjarsupport**

Fjarsupport merkir her, at tann sum veitir hjálp yvirtekur telduna við tínum rættindum. Tú eigur at fylgja við á telduni, meðan tú fært hjálp. Tá hjálpin er liðug, skalt tú tryggja tær, at viðkomandi hevur loggað av tíni teldu. Ert tú í iva, spyr úrvalsbrúkaran. á stovninum.

**Tilgang bara upplýsingar, sum eru neyðugar í tínum arbeiði**

Starvsfólk skulu bert brúka upplýsingar, sum eru neyðugar fyri, at tey kunna fremja teirra arbeiði. Hetta merkir eisini, at tú ikki leitar eftir upplýsingum, sum tær ikki nýtist í tínum arbeiði.

**Hvar kunnu trúnaðar/viðkvæmar upplýsingar goymast**

Fyri at vit kunnu lúka trygdina fyri upplýsingar á stovninum, skalt tú kunna teg um trygdarstigið á upplýsingunum og skipanum á tínum arbeiðsøki og starva eftir tí. Eitt amboð í hesum sambandi er Dátuflokkingaryvirlitið, sum stovnurin hevur.
Trúnaðarupplýsingar ella viðkvæmar upplýsingar mugu ikki verða goymdar í skipanum, sum eru ikki flokkaðar á hesum stigi.
T.d. er fíluservarin tað staði, tú goymir tínar fílur, t.d. word, excel og powerpoint. Hetta er eisini staðið, har deildir, bólkar e.t. goyma síni skjøl í felagi. Fíluservarin er ikki flokkaður at bera viðkvæmar upplýsingar sum er.
Verða stig tikin til at skipa nýggjar upplýsingar (goymslur) t.d. í rokniørkum o.tíl., skal støða verða tikin til, hvussu tær verða tryggjaðar við atliti at atgeingi, rættleika og trúnaði.

**Verja upplýsingar**

Tað er ikki loyvt at taka trúnaðarupplýsingar ella loyniligar upplýsingar við tær út úr bygninginum, har stovnurin heldur til, uttan so at upplýsingarnar eru væl vardar.
Frágreiðingar, serligar uppsetingar, rokniørk, listar o.tíl., sum starvsfólk gera, skulu ikki verða goymd á skriviborðinum á telduni men t.d. á fíluambætarum. Tilfar, sum liggur á skriviborðinum á telduni verður ikki trygdaravritað.
Trúnaðarupplýsingar ella loyniligar upplýsingar, eins og skjøl annars, sum ikki mugu koma óviðkomandi í hendi, mugu ikki verða tveitt í ruskílatið, men skulu verða sundurkarvað (makulerað).

**Brot á trygdarpolitikkin**

Øll starvsfólk hava skyldu at fylgja trygdarreglunum, sum stovnurin hevur sett. Brot á trygdarreglurnar kann, alt eftir umstøðunum, elva til revsitiltøk (sanktiónir), millum annað setanarrættarligar avleiðingar.
Er illgruni um óreiðilig viðurskifti, mistøk ella trygdarveikleikar, skal tað verða fráboðað næsta leiðara ella KT-trygdarfólki beinanvegin.